# Byrja uppá røktarheimið í mars




**Vestmanna:** Eftir eitt ávíst samskifti millum Fíggjarmálaráðið og Vestmanna Kommuna eru tey vorðin samd um ein leist, soleiðis at vestmenningar eisini fáa sítt røktarheim (sí tekning).

At byrja við vóru Fíggjarmálaráðið og kommunan ikki samd um, at fíggjarætlanin hjá kommununi leyk allar tær treytirnar, sum settar vóru kommununi í sambandi við lántøkuna til røktarheimsbyggingina.

Seinni samtykti bygdarráðið at broyta fíggjarætlanina, so ongin ivi skuldi vera um, at allar treytir vóru loknar.

- Nakrar sparingar eru nú gjørdar, soleiðis at hallið fyri 2010 lækkar úr góðum 3,5 niður í 2,8 mió krónur, verður sagt úr Vestmanna kommunu.

Váttan er nú komin frá Fíggjarmálaráðnum um, at broytta fíggjarætlanin lýkur teirra treytir, og at Fíggjarmálaráðið tí hevur givið Almannamálaráðnum boð um at senda kommununi eina váttan um stuðul.

Um onki óvæntað hendir, so verður byrjað upp á røktarheimið í februar ella mars 2010.

**sb.**





GASTRONOMISKUR KOKKANÆMINGUR TIL NORRÖNU

Søkt verður eftir gastronomiskum kokkanæmingi til galluna umborð á Norrönu at byrja skjótast gjørligt.

Smyril Line bjóðar áhugavert og avbjóðandi læruppláss sum gastronomiskur kokkur í einum altjóða umhvørvi. Lærutíðin er 3 ár og 9 mánaðar. 47 vikur av lærutíðini er á skúla í Aalborg, harav 20 vikur eru grundskeið.

Vit vænta, at tú:
- ert kreativur, lagaligur og hevur ábyrgdarkenslu
- hevur hug og evni at arbeiða saman við øðrum
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- ert fleksibul og hevur gott sinnalag

Vit bjóða:
- eitt spennandi og krevjandi starv á einum stórum og fjølbroyttum arbeiðsplássi
- góðar umstøður og gott arbeiðsumhvørvið
- góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning
- arbeið og frítíð í lutfallinum 1 til 1

Setanarviðurskifti
Starvið verður lønt sambært galdandi sáttmála.

Størvini verða sett skjótast gjørligt, men vit bíða fegin eftir tí rætta. Umsøkjarar, ið hava lokið grundskeið innan kokkafakið, hava fyrimun. Lærutíðin verður í hesum sambandi stytt við 20 vikum.

Umsóknir og CV skulu sendast við telduposti til hesa tilskrift innan mánadag 1. februar:

chef.manager@norrona.fo
Tel. 344850 / 344835

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Týsklandi og Danmark. Umfram egnar skrivstovur, hevur felagið eisini aðalsøluumboð í Bretlandi, Beligu, Fraklandi, Hollandi, Italiu, Pólandi og Svøríki. Smyril Line hevur eisini tætt samstarv við samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · YVIRI VIÐ STROND 1 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.FO


Sosialurin
Sosialurin i



*Ung brúka meiri og meiri tíð frammanfyri skíggjan, vísir donsk kanning*
*savnsmynd*

## 10 tímar við skíggjan um dagin

**Børn og ung eru stórbrúkarar av telduspølum, interneti og sjónvarpi vísa nýggj tøl frá barna- og ungdómsindeksinum hjá Gallup-stovninum. Tølini órógva kortini ikki granskarar!**

UNGDÓMUR
*Snorri Brend*

**Danmark:** Fimm ára gomul børn brúka í miðal hálvan fimta tíma til miðlar hvønn einasta dag. Og tey 14-16 ára gomlu brúka 10 tímar til hetta um dagin, skrivar søndagsavisen.dk.

Tað sum órógvar mong er, at tímatalið er hækkandi: Eftir bert tveimum árum er miðlanýtslan hjá teimum ungu hækkað við 1,5 tíma um vikuna.

Orsøk er kortini ikki til at óttast, heldur ein serfrøðingur í nýtsluni hjá børnum og ungum av talgildum miðlum.

- Vit hava fingið miðlar, sum nøkta nakrar av mátunum sum børn spæla, samskifta og eru saman við øðrum uppá, sigur Birgitte Holm Sørensen.

Hon er professari á Danmarks Pædagogiske Universitetsskole á Lærda Háskúlanum í Århus, og er haraftrat forkvinna fyri Medierådet for Børn og Unge.

### Telduspøl

Tað eru serliga telduspølini sum virka dragandi uppá børn og ung við síni avbjóðing, kappingarevni og søgu.

- Mong "univers" í telduspølunum hava bókina í sær, vísir Birgitte Holm Sørensen á.

Telduspøl, internet, útvarp og sjónvarp nøkta í dag sama tørv sum spøl og bøkur gjørdu áður. Samstundis skapa tey ein heilt nýggjan máta hjá børnum og ungum til samveru.

- Telduspøl og sjónvarp kunnu saktans vera partur í samveruni við onnur børn, og tí nýtist hetta ikki beinleiðis at vera ein trupulleiki, sigur miðlagranskarin, Anne Mette Thorhauge.

Miðlagranskarin, sum starvast við Lærda Háskúlan í Keypmannahavn kemur eisini við góðum ráðum til foreldrini um, hvussu tey kunnu síggja um nýtslan av miðlunum er ov stór:

- Tey spæla ov nógv, tá tað hevur negativar avleiðingar í gerandisdegnum, - altso um tað gongur út yvir vinarlagið ella skúlan, sigur altso Anne Mette Thorhauge.

> *Tey spæla ov nógv, tá tað hevur negativar avleiðingar í gerandisdegnum, - altso um tað gongur út yvir vinarlagið ella skúlan*